## Mancini bakkar

Hóast nýggi venjarin hjá Manchester City, Roberto Mancini, hevur verið sera bjartskygdur, síðani hann tók við starvinum, bakkar hann nú eitt sindur. Áður hevur hann sagt, at City skal roknast millum favorittarnar at vinna ensku Premier League í ár, men nú er hann eitt sindur varnari. – Í míni verð eru tað bara Chelsea, Manchester United og Arsenal, sum kunnu væntast at gerast enskir meistarar hetta kappingarárið, sigur Mancini, ið tó er til reiðar at taka av, skuldu hini liðini frammanfyri snávað.



## Silberbauer vil víðari

Michael Silberbauer, sum í síni tíð var liðfelagi við Toda Jónsson í FCK, hevur so nógvan vind í seglunum í hollendska Utrecht, at hann møguliga skjótt verður á veg til Onglands. Umboðsmaður hansara, Karsten Aabrink, heldur hann vera so væl fyri, at næsta avbjóðingin kann verða í Premier League. Fyrr hevur eitt nú Blackburn víst áhuga. Tá FCK í 2004 spældi nakrar vinardystir í Føroyum, kom Michael Silberbauer í fokus, tí hann var tikin fyri rúsdrekkakoyring.



Kviki og krútsterki Everton-framherjin, Yakubu Aiyegbeni, fekk veruliga víst sítt virði, tá hann við sigursmálinum ímóti Benin helt lív í vónini hjá Nigeria í African Nations Cup

## FAKTA

**Navn:** Yakubu Aiyegbeni
**Føðingardagur:** 22. november, 1982
**Uppvøkstur:** Benin City
**Hædd:** 183 cm
**Vekt:** 83
**Pláss:** Framherji
**Felag:** Everton

**Yrkisleið**

| | |
|---|---|
| **1997-1998:** | Gil Vicente |
| **1999-2003:** | Maccabi Haifa |
| **1990-2000:** | Hapoel Kfar Saba, leiguavtala |
| **2000-2001:** | Dynamo Kiev, leiguavtala |
| **2002-2003:** | Portsmouth, leiguavtala |
| **2003-2005:** | Portsmouth |
| **2005-2007:** | Middlesbrough |
| **2007-:** | Everton |

# Yakubu aftur bjargingarmaður

**Tað er framvegis lív í fótbóltsvónini í Nigeria. Tað syrgdi Yakubu Aiyegbeni fyri leygardagin, tá hann stóð fyri einasta málinum í dystinum móti Benin**




Uni Holm Johannesen

Navnið Yakubu Aiyegbeni var um vikuskiftið aftur at síggja á flestu forsíðunum í nigeriansku miðlum. Eina ferð enn er tað sum bjargingarmaður og hetja, at miðlarnir seta fokus á kvika og krútsterka framherjan. Yakubu stóð leygardagin fyri einasta málinum í dystinum, tá Nigeria vann 1-0 á Benin. Har við hava Yakubu og liðfelagarnir framvegis møguleikan at vinna seg víðari úr bólkaspælinum í African Nations Cup.

Nigeria hevði í fyrsta umfarinum tapt 3-1 móti Egyptalandi, og tí vóru trý stig eitt krav í seinna umfarinum móti Benin. Við millum annað John Obi Mikel, Joseph Yobo og Chinedu Obasi í byrjunaruppstillingini, loysti Nigeria uppgávuna. Og sum so ofta fyrr var tað Yakubu, sum syrgdi fyri avgerandi málinum. At Yakubu er føddur og uppvaksin í Benin City í Nigeria verður eisini flent at.

Yakubu fekk sítt altjóða gjøgnumbrot hin 30. oktober í 2002. Tá skeyt hann øll málini fyri Maccabi Haifa úr Ísrael, sum púra óvæntað smurdi Manchester United av við 3-0 í bólkaspælinum í Champions League. Og síðan er hann vorðin víðagitin fyri sítt fram úr máltev.

### Yakubu er álitið

27 ára gamli Yakubu hevur seinastu sjey árini spælt í bestu ensku fótbóltsdeildini. Hann skifti í 2003 til Portsmouth, har hann eftir tveimum árum hevði skotið 36 mál. Umvegis Middlesbrough, flutti hann í 2007 til Everton, har hann hevur spælt seinastu trý árini.

Hóast Nigeria hevur fleiri spælarar í hópinum, sum hava staðið seg væl í ymsum evropeiskum fótbóltskappingum, er tað Yakubu, sum er álitismaður. Hann hevur altíð skotið eina rúgvu av málum, og tað verður eisini væntað av framherjanum, at hann fer at skjóta neyðugu málini fyri Nigeria í ársins útgávu av African Nations Cup.

Nigeria skal aftur í eldin mikudagin, tá mótstøðuliðið er Mozambique. Ein javnleikur hevur við sær, at Nigeria sleppur í fjórðingsfinaluna.

# Fílabeinsstrondin og Egyptaland víðari

Annað umfar í øllum bólkaspølunum í African Nations Cup varð endaliga avgreitt í gjár. Og longu nú er greitt, at Fílabeinsstrondin og Egyptaland hava vunnið seg víðari.

Fílabeinsstrondin vann seg fríggjadagin upp á seks stig í bólki B, tá Didier Drogba og liðfelagarnir vunnu 3-1 á Ghana. Við 2-0 sigrinum á Mozambique leygardagin vann Egyptaland seg somuleiðis upp á seks stig í bólki C.

Cameroun vann í gjárskvøldið við bit og slit á Zambia. Sigurin hevði við sær, at Cameroun framvegis livir í vónini. Teir hava tørv á í øllum einum stigi í seinasta dystinum móti Tunesia hósdagin fyri at vinna seg víðari.

uni